## DAGSINS MEINING

# Nýggj menningarleið?

Handilssambandið við Japan við í dag hava varð m.a. grundað sum úrslit av eini týðandi vitjan í Japan í 1983, fyriskipað av táverandi ídnaðarráðgevanum Tórmóði Dahl, sála. Nú hava so føroyingar aftur verið á vitjan í hesum fjarskotna men fyri okkum týdningarmikla landið landið marknaði. Eftir øllum at døma kann burtur úr hesi vitjan koma ein sera áhugaverd ætlan. So nú er at fáa hana at eydnast. Og fyritreytirnar fyri at hon skal eydnast eru góðar, tí í dag byggja vit alt hetta á bæði føroyska, norska og íslendska vitan.

Næsta stigið verður at byggja umrødda virkið í Lorvík og síðani skapa grundarlag fyri at fáa rávøruna til lands. Sigast má, at tað er við framskygdum og framfýsnum fólkum, at henda ætlan verður sett út í kortið og vónandi gerst veruleiki, fólkum, sum hava skil á at reka skip og at reka virki. Betri kann kombinatiónin ikki verða. Tí mugu allir føroyingar fult út stuðla hesi nýhugsan, sum jú hevur við sær, at vit troyta alt tilfeingi og ikki sum í dag, har partar av fiskinum ikki verða brúktir. Við hesi ætlan skulu bæði innvølur og livur koma til lands eisini.

Í áhugaverdu sjónvarpssendingini í vikuni hoyrdu vit, at reiðarar eru við at búgva seg til at byggja skipini, at henda ætlanin kann lata seg gera. Tað er sera positivt.

Men so mugu eisini aðrir spurningar loysast. Tað hevur nevniliga víst seg at vera ein trupulleiki við býtislutfallinum hjá manningarfeløgunum, tá livur og innvølur skulu takast við til lands. Fyrr var tað soleiðis, at rogn, sil oa. man tók til ísfisk við føroyskum trolarunum býtti manningin millum sín, og reiðaraííni tóku ikki so stóran part av tí. Okkurt týðir uppá, at man verður noyddur at gera eina líknandi skipan nú framyvir, skal hetta projektið eydnast. Og tað eiga manningarfeløgini og reiðaríini at hava í huga við næstu samráðingum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Føðilandið – »Eitt lorta land«?

**Asbjørn Lómaklett**



**Løgin og syrgilig niðurstøða:**
Nakað herfyri stóð grein í bløðunum, har kendur fjølmiðlamaður skýrdi Føroyar »eitt lorta land«, av tí at nakað av troti var komið í kassan, ið fíggjar sjúkraflutningin til Danmark. Í hesum sambandi var onkur komin at liggja ímillum – eina tíð – í hvussu er. Hetta er sjálvandi harmiligt, men uttan iva, so verður onkur nýtilig loysn funnin til ta tíð, tá tað aftur fløðir í kassanum. Øll ynskja vit, at tey sjúku skulu fáa so góð kor viðvíkjandi røkt og hjálp, sum á nakran hátt gjørligt. Hetta eru vit samd um.

Hinvegin, so má ásannast, at henda góða skipanin at senda sjúklingar av landinum til serviðgerðir kostar samfelagnum almikið av peningi. Sagt verður, at í ár eru útreiðslurnar u.l. 80 mill. kr. móti teimum ætlaðu 60 mill.kr.

Hetta hevði svarað til, at **Danmørkin nýtti u.l. 8 milliardir kr. um árið** at senda part av sínum sjúklingum til Týskaland til dømis, og sambært »TV-Rapportini«, so kundi hetta verið neyðugt í summum førum.

**Virðing fyri landsstýrismanninum, Bill Justinussen:**
Tað er tí als einki løgið, um landsstýrismaðurin fer at kanna, um skipanin ikki kann gerast bíligari samstundis, sum tænastustøðið verður varðveitt á forsvarligan hátt, tí 80 mill. kr. er mikil upphædd í okkara samanhangi. Hinvegin veit landsstýrismaðurin, at økið er sera kensluborið, og at politiskur opportunistar alt fyri eitt fara at koma við ósakligum atfinningum við teirri ætlan at kóka sær politiska súpan av evninum og ikki hevur skortað av slíkum, síðani málið kom fram. Kent er eisini, at fleiri ynskja **ikki** at reka hetta samfelagið bíligari vegna tess, at so kundi jú tað »ræðuliga« hent, at vit gjørdust búskaparliga sjálvberandi.

Tað er tí at vóna, at landsstýrismaðurin veruliga ger nakað við hetta málið, so sum mest og best fæst fyri peningin, ið nýttur verður til endamálið, tí eingin skipan er so fullkomin, at henni ikki tørvar kanningar og eftirmetingar við jøvnum millumbilum.

**Aftur til »lorta landið«:**
Tað er helst bara í Føroyum, at nakar **alment** fer at kalla sítt egna føðiland fyri »eitt lorta land« og fáa undirtøku fyri hesum frá fleiri av landsmonnum sínum í sambandi við, at ein partur av samfelagsskipanini er komin í fyribils trupulleikar, og har sakkunnleikin sigur, at teir hava funnið loysnir, ið kunnu halda forsvarliga árið út, men soleiðis er støðan tíverri.

Hetta sýnir eisini, hvussu stríðið millum sjálvstýrishugsjónina og sambandið eitrar tað politiska lívið og føroysku fólkasálina ella samleikan undir einum, og tað er eisini veruleiki, at okkurt um helmingurin av politisku orkuni her á landi fer til beiska stríðið um samband/ikki samband. Hetta er sjálvandi til stóran skaða fyri okkum sum land og tjóð.

Tað tykist, sum um partur av føroyingum nær um »gleðist«, tá okkurt ikki riggar, og sagt verður við ikki sørt av skaðafrøi: »Var tað ikki tað, ið vit søgdu, at tá føroyingar fara at stýra, so gongur alt av skriðuni til«?

Til hetta er at siga, at við hvørt gongur illa í hond hjá øllum. Tað kann eins væl vera í Danmørkini sum í Føroyum, men at kalla sítt egna land fyri »lortaland«. Ja, eitt er, hvat tú hugsar í einari illsinnisløtu, **men at skriva tað í yvirskrift!!!**

**Hetta gera danir ikki:**
Kenni einki dømi um, at tað kemur fyri í Danmark, at kendir persónar kalla fosturlandið fyri »lorta land« í nøkrum landsfevnandi tíðindablaði, hóast mong skipan har niðri eisini hevur brek, sum vit hava sæð í donsku sjónvarpssendingunum »Rapporten«, tá teir hava sett »fokus« á ymisk viðurskifti, og vit hava ógvast við, men donsku journalistarnir **kalla ikki Danmark fyri eitt lorta land** fyri tað. Donsk bløð høvdu sett slík lesarabrøv við sera smáum bókstøvum onkustaðni niðast við mitt inn í blaðnum, har eingin hevði lisið tey, men í Føroyum verða síðurnar ruddaðar, so pláss kann gerast fyri **»feitum yvirskriftum«**, tá Føroyar verða svertaðar til. Her er helst munurin millum vinnarahugburðin í einari frælsari tjóð og taparahugburðin hjá einari ófrælsari, ið ikki veit, hvat hon vil, men helst vil vera bæði.

Tað sær út, sum um summir føroyingar fegnir vilja undirmeta og niðurgera sjálvan seg sammett við aðrar tjóðir, serliga danir, hóast vit als onga orsøk hava til tess, tí tað er royndur lutur, at har føroyingar eru saman við øðrum, megna vit avgjørt allar avbjóðingar eins væl og aðrir, men tíverri trúgva mangir av okkara landsmonnum als ikki hesum roynda luti og veruleika.

# Føroyingur druknaður í Grindavík

**Ein av manningini á Stapanum varð týsdagin funnin druknaður í havnini í Grindavík í Íslandi**

VANLUKKA
*Edvard Joensen*

Ein 35 ára gamal maður, sum var við Stapanum, druknaði í Íslandi mánakvøldið. Líkið varð funnið aftur týsdagin.

Anfinn Olsen, reiðari á Stapanum, sigur, at Stapin lá inni í Grindavík til umvælingar mánakvøldið, og nakrar av manningini vóru farnir í land. Tað var heilt nógvur vindur í Grindavík hetta kvøldið, sigur reiðarin.

Sum út leið, og menninir vóru komnir umborð aftur, var tann 35 ára gamli maðurin saknaður, og farið varð at leita. Leitað var uttan úrslit, og løgreglan varð síðani boðsend.

Týsdagin varð líkið funnið í havnini í Grindavík, greiðir Anfinn Olsen frá. Málið verður í løtuni kannað av íslendsku løgregluni.

Tann 35 ára gamli maðurin, sum var ættaður úr Saltangará, var ógiftur.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Rás Tórshavn til áminningar

**Klæmint Olsen**



Rás Tórshavn er ikki longur. Hon sloknaði í nátt. Heilt bókstaviliga.

Tórshavnar kommuna, ið varðaði av, helt seg ikki longur til at lívga rásina. Hon varð vorðin ein klepp-ur um beinini. Ovboðið gjørdist, tá ið gjaldast skuldi fyri TV3. Tó vantaði helst eisini onkur íløga í afturat í Kollafirði.

Onkra staðni var myndagóðskan kanska so sum so. Tey allarflestu mundu tó við síni vanligu antennu síggja rásirnar á nøktandi hátt. Ójøvnu móttøkulíkindini eru óivað eitt brek, ið nýggja sendistøðin arvar.

Eftir stendur, at øll húski í Havn (tí tað munnu vera fá, ið ikki hava sjónvarp) á hendan hátt høvdu "ókeypis" atgongd til fimm rásir. Í eitt longri áramál hevur verið talan um tær somu fimm.

Av og á valdaði ósemja um, hvørjar rásir ið frægast vóru. Eina ferð gav at bíta, tá ið Eurosport skuldi strikast. Eina aðru ferð vóru harðlig mótmæli frá ungdóminum, tá ið sama skuldi henda MTV (kommunan noyddist at gjalda). Eisini var harðligt orðskifti, um vit skuldu síggja norskt TV3 ella danskt. Og eina tíð var tann stóri spurningurin, um BBC skuldi strikast, men endaði tað við, at vit sóu bæði World og Prime.

Tað kann undra, hví eingin mótmælir nú.

Mín greiða niðurstøða er annars, at flest øll hava verið nøgd við skipanina. Og í dag mugu vit helst staðfesta (kanska tíverri), at vit hava vant okkum við at hyggja at hesum rásum. Ein tørvur er íkomin.

Helst vildi tú onkuntíð sloppið at sæð aðrar rásir við, men tær fimm, ið verið hava, hava tó bjóðað eitt sindur av hvørjum. Til ung og gomul. Til undirhalds og til kunningar. Og tey, ið ikki hava fingið nøktað sín tørv á hendan hátt, hava so allatíðina havt í boði at keypt sær parabol (um eigarafelagið ikki longu hevði avgreitt málið).

Hóast ymiskt kann sigast ímóti - t.d. um hóttan móti føroyskari mentan og tílíkt - so fari eg at halda uppá, at tað hevur verið gevandi, bæði fyri ung og gomul, høg og lág, at sloppið at hugt at teimum fimm rásunum. Eg ivist ikki í, at bæði, tá ið tað snýr seg um upplýsing og mál, hevur tað givið okkum eitt gott íkast.

Men so er ikki longur. Býráðið hevur nú latið tað í hendurnar á einum útbjóðara at nøkta tørvin á hesum øki. Hesin útbjóðarin skal sjálvsagt hava sítt goldið, og tað vísir seg nú, at minni munur verður á at keypa sær ein parbol og fara upp í ta skipanina. Eftir øllum at døma ætlar kommunan ikki at geva nakað íkast til framhaldandi virksemi.

Sjálvsagt veit eg væl, at kommunan hevur fyrimunir av nýggju skipanini. Fyri tað fyrsta sleppur hon undan ábyrgd, og fyri tað næsta sparir hon pening. Men ber kommunan seg rætt at?

Eg haldi tað vera skeivt at geva skarvin yvir á hendan hátt. Tórshavnar kommuna hevur í mong ár bjóðað øllum borgarunum hesa tænastu, men nú er vell. Hjá honum, ið hevur ráð, ber til at halda fram, men hjá honum, ið er verri fyri, verður slitið.

Ein kommunal tænasta er í dag frátikin teimum, ið ringast eru fyri sosialt. Ein munur, ið ikki var áður, tekur seg nú upp millum fólk, og fer hetta eisini at merkjast á tí mentanarliga økinum. Fólk við hampuligari inntøku hava onga neyð, men eg ivist onga løtu í, at mong børn, ung og gomul fara at kenna seg við sviðið soð.

Fyrr ella seinni hevði tað helst verið rætt av kommununi at latið umsitingina av Rás Tórshavn á aðrar hendur, tí ymsar tøkniligar avbjóðingar standa fyri framman. Kanska løtan eisini er tann rætta. Men heilt at sleppa endanum, sum kommunan tykist at hava gjørt, tykist óumhugsað og óstortsligt. Kommunan átti at borið so í bandi, at til bar hjá borgarunum at knýta seg at nýggju sendistøðina á ódýran hátt. Hetta við t.d. at keypa rásir og/ella við at stuðla keypi av móttakaratólum.

Løgið kortini, hvussu søgan byrjaði, og hvussu hon endaði. Rás Tórshavn hevði ikki ráð til TV3, tí máttu aðrir taka yvir, men hvat er nú vorðið av TV3?

# Harðskapur móti kvinnum

**25. nov. 2002 »Altjóða dagur móti harðskapi ímóti kvinnum«**

Søgan aftanfyri henda altjóða dag móti harðskapi ímóti kvinnum byrjar fyri 42 árum síðan, tann 25. november 1960 í tí Dominikanska lýðveldinum. Systrarnar Minerva, Maria Teresa og Patria Mirable lótu lív í eini fyriskipaðari bilvanlukku. Tær vóru allar tríggjar virknar í stríðnum ímóti einaveldinum.

Patria, tann elsta, var ákærd fyri at stuðla mótstøðurørsluni og hon, maður hennara og 12 ára gamli sonurin sótu leingi fongslað.

Minerva, miðlingurin, var feminist. Hon var tann fyrsta kvinnan í Dominikanska lýðveldinum ið roykti og koyrdi bil alment. Hon var fongslað 4 ferðir.

Maria Teresa, tann yngsta, var virkin í mótstøðurørsluni. Hon var fongslað fleiri ferðir og pínd.

Í 1981 avgjørdu kvinnur úr Latín Amerika og Karibien at gera 25. november til altjoða dag móti harðskapi ímóti kvinnum. Í dag halda kvinnurørslur um allan heim hendan dagin fyri at sjónliggera harðskap ímóti kvinnum.

Harðskapur og mishandling av kvinnum er ein altjóða trupulleiki.

Ein út av trimum kvinnum í allari verðini hava verið fyri harðskapi.

Umleið fjórða hvør kvinna upplivir harðskapin í sínum egna heimi.

19% av heilsuskaðum hjá kvinnum skyldast harðskap.

5.000 kvinnur og gentur útsetast hvørt ár fyri heiðursdráp av síni egnu familju.

Fýra milliónir kvinnur og gentir verða árliga keyptar og seldar um alla verðina. Antin í hjúnaband, til prostitutión ella trælahald.

Í frágreiðing frá ST verður mett at umleið 2 milliónir gentur verða umskornar hvørt ár.

Talið á neyðtøkum ímóti kvinnum er fjalt, tí flestu neyðtøkur verða ikki fráboðaðar.

Útlendskar kvinnur ið fáa arbeiðs- og uppihaldsloyvi grunda á hjúnalag eru uttan rættarvernd, um tær fara frá manninum fyrstu sjey árini, tí hann fremur harðskap ímóti teimum. Tær verða vístar av landinum.

Pornografiskar myndir í fjølmiðlunum, har kvinnur og gentur eru fyri kynsligum ágangi og serliga myndlýsingar av neyðtøku, hava skaðiligar fylgir, serliga á børn og ung.

Í Danmark skrásetur løgreglan árliga 10.000 tilburðir av harðskapi móti kvinnum. Havast skal í huga, at hettar talið fevnir bert um teir tilburðir ið verða meldaðir til løgregluna. Í Føroyum verður alt skrásett sum húsaófriður, tí eru ongi beinleiðis tøl fyri, hvussu nógvir tilburðir eru av harðskapi ímóti kvinnum.

Í Eysturíki sigur lógin, at tá ein maður fremur harðskap ímóti kvinnu í teirra egna heimi, so er tað maðurin ið skal flyta úr heiminum, kona og børn verða búgvandi. Vónandi verður henda lógin einaferð veruleiki í Føroyum.

Í Føroyum setti løgtingsmaður fram fyrispurning í løgtinginum um striptease er lóglig í Føroyum. Tað er tað ikki, men onkur skal melda málið áðrenn løgvaldið tekur stig til at forbjóða striptease.

Í Íslandi eru í dag 14 bordellir. Byrjanin var, eins og í Føroyum nú, vitjan av donskum striptease-dansarinnum av og á. Latið okkum virka fyri, at prostitutión ikki fær ment seg her á landi.

Vónandi elvir hetta tiltak til kjak um harðskap ímóti gentum og kvinnum.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum,
at okkara elskaði sonur, beiggi, mammubeiggi
og ommusonur

**Høgni á Borg**
**Tórshavn**

andaðist mánadagin 2. desember 2002,
32 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni hósdagin kl 13.

**Guðrun, Heini,**
**Marian, Jákup, Annika**
**Guðrið og Anna**

†

Góða mamma, vermamma og omma okkara

**Marianna Jacobsen**
f. Mortensen
**úr Vági**

andaðist 2. desember, 74 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Vágs kirkju
leygardagin 7. desember kl. 13.00.

**Marjun, Kári, Kristin og Sunnuva**
**Elsmaria, Ole og Kira**
**Mortina, Stein, Annika, Sára og Marianna**

*Tað ber til at minnast mammu við eini gávu til Vágs kirkju.*

# Arne Berg

**1937 - 2002**



Eftir stutta sjúkralegu andaðist Arne Berg sunnudagin 1. desember, 65 ára gamal. Arne Berg er føddur í Klaksvík í 1937. Hann var sonur Onnu Elisabeth, f. Hansen, og Elias Berg. Arne byrjaði at læra til bilmekanikara í Havn í 50-unum. Hann gjørdi seg tó ikki lidnan, men fór aftur til Klaksvíkar at búgva. Í 1960 giftist hann við Áslu, f. Toftenæs, úr Leirvík, og fyrst í 60-unum búsettust tey í Havn. Ásla andaðist 29. mars í ár, 65 ára gomul: Tey fingu børnini: Eilev, Oddmar, Eydnu, Dagfinn og Páll Árna.

Arne koyrdi hýruvogn í Havn á bilstøðini BIL og í Auto í 60-unum. Eisini koyrdi hann lastbil, tá Oyggjarvegurin bleiv gjørdur. Frá 1970 til 1982 arbeiddi hann hjá Strandferðsluni og koyrdi hýruvogn í frítíðini. Síðan 1983 hevur hann rikið tveir býbussar fyri Bussleiðina í Havn.

Friður verið við minninum um Áslu og Arna Berg.

**m.g.**